*– Her í USA kann Khatami siga tað, honum lystir og hitta tann, hann vil*

*Hvítu Húsini*

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK
TLF 341800

ÚTLOND

# Carter vil hitta erkafíggindan



*Jimmy Carter*



*Mohamad Khatami*

**Iranska kollveltingarstýrið beindi fyri øllum møguleikunum hjá Jimmy Carter at halda fram sum forseti, men kortini er hann sinnaður at hitta erkafíggindа sín.**

Viðurskiftini millum USA og Iran hava verið ísakøld, síðani iranskir studentar tóku 52 amerikanarar gíslar á sendistovuni í Teheran undir kollveltingini í 1979. Iranska móstøðan ímóti USA var ikki bara vend ímóti landinum, men eisini forsetanum, Jimmy Carter.

Gíslatøkan vardi heilar 444 dagar, men hóast allir gíslarnir sluppu heimaftur í øllum góðum, varð tað ikki Carter, sum fekk æruna. Gíslatakararnir valdu at bíða við at lata gíslarnar leysar, til Carter hevði latið Ronald Reagan forsetaembætið tann 20. januar í 1981.

Kortini er Jimmy Carter til reiðar at hitta ein av teimum fremstu iransku kollveltingarmonnunum, fyrrverandi forsetan Mohamad Khatami, sum er í USA í hesum døgum. Khatami fekk fyrr í vikuni innferðarloyvi til USA, men hann er á privatari vitjan, tí í dag hevur hann einki leiðandi politiskt starv í Iran.

– Carter hevur alla orsøk til at harmast tað, sum iranska kollveltingarstýrið gjørdi ímóti honum, og hóast Khatami ongantíð hevur sagt seg vera ímóti tí, sum ayatollah Khomeini gjørdi, vil Carter fegin tosa við hann, sigur ein talsmaður hjá Carter við The Independent.

Hvítu Húsini í Washington siga seg ikki hava nakað ímóti, at teir báðir fyrrverandi forsetarnir hittast.

– Her í USA hevur Khatami frælsi til at siga tað, sum honum lystir, og hann kann tosa við tey, sum hann vil tosa við, sigur ein av talsmonnunum hjá Hvíotu Húsunum við bretska blaðið.

Sambært blaðnum hevur Khatami játtað at hitta Carter, men tað er ikki greitt, nær ella hvar tað verður.

STUTT SAGT

## Valið verður spennandi

Alt bendir á, at ríkisdagsvalið í Svøríki um fjúrtan dagar verður sera spennandi.

Tær seinastu meiningakanningarnar benda kortini á, at teir borgarligu flokkarnir fara at vinna, og at sosialdemokratarnir noyðast at fara frá eftir at hava sitið við landsins leiðslu tey seinastu tólv árini.

Tað er eisini líkt til, at teir borgarligu fara at vinna valið í høvuðsstaðnum. Síðani 2002 hevur ein reyð/grøn samgonga stýrt býráðnum í Stockholm, men ein kanning hjá Dagens Nyheter vísir, at teir borgarligu fara at vinna hesaferð. Er kanningin eftirfarandi, fáa teir borgarligu flokkarnir góð 11 prosent fleiri atkvøður í høvuðsstaðnum enn sosialdemokratarnir og teirra stuðulsflokkar.

Tey, sum hava gjørt kanningina fyri Dagens Nyheter, vænta ikki, at sosialdemokratarnir kunnu venda gongdini nú so stutt undan valinum. Í øllum førum skal nógv til, siga tey.

## Grønmeti heldur enn opium

Síðani Taliban-stýrið varð rikið frá valdinum í Afghanistan fyri fimm árum síðani, eru afghansku bøndurnir farnir at dyrka opium sum ongantíð fyrr, men nú skulu teir fáast at dyrka grønmeti ístaðin fyri.

Amerikanska stjórnin hevur gjørt av at fara undir eitt átak, sum skal steðga opiumdyrkingini. Ætlanin er at veita bøndrunum fíggjarligan stuðul, so tað skal loysa seg betur at dyrka grønmeti enn opium, samstundis sum opiummarkirnar verða oyðilagdar. Teir bøndur, sum ikki leggja um við góðum, skulu sektast og kunnu enda í fongsli.

Fylgisveinamyndir hava avdúkað, at opiummarkirnar í Afghanistan eru næstan 80 prosent størri nú enn fyri tveimum árum síðani. ST sigur, at ein triðingur av afghanska búskapinum stavar frá opiumdyrkingi og rúsevnahandli, og at 87 prosent av øllum heroini í heiminum kemur úr Afghanistan.

## Russar upp í Airbus



*Russar eiga nú fimm prosent av fyritøkuni, sum ger Airbus-flogførini*

Herfyri kunngjørdi russiska stjórnin, at Russland er vorðið skuldarfrítt, og at landið nú ætlaði sær at gera íløgur uttanlands.

Nógv bendir nú á, at russar hava gjørt sína fyrstu íløgu, tí sambært bretska blaðnum Financial Times hevur russiski uttanríkisbankin keypt umleið fimm prosent av partabrøvunum í felagnum EADS, sum eigur evropeisku flogverksmiðjuna Airbus. Sambært fronsku tíðindastovuni AFP hava russar goldið umleið eina milliard dollarar fyri partabrøvini.

Tað er ikki greitt, hvørjar ætlanir russar hava við at keypa seg inn í Airbus, men russiskir viðmerkjarar halda, at keypið er ein roynd hjá Vladimir Putin, forseta at umskipa og nýskipa tann russiska flogídnaðin. Ein onnur frágreiðing kann sambært viðmerkjarunum vera, at EADS eigur tíggju prosent av russisku fyritøkuni Irkut, sum ger flogfør til russiska flogvápnið. Við keypinum koma russar nú at sita báðu megin borðið.

# Máttmiklar kvinnur

**Týski kanslarin, Angela Merkel, er máttmesta kvinna í heiminum.**



*Angela Merkel er heimsins máttmesta kvinna*



*Condoleezza Rice var tann máttmesta kvinnan í fjør*



*Hillary Clinton hevur eisini vald og ávirkan*

Tað skrivar amerikanska tíðarritið Forbes.

Blaðið hevur júst almannakunngjørt eitt yvirlit við nøvnunum á meiri enn 100 av teimum máttmestu kvinnunum í heiminum. Á fyrsta plássi er týski kanslarin, Angela Merkel. Næst henni er amerikanski uttanríkisráðharrin, Condoleezza Rice, sum var á fyrsta plássi í fjør, og á triðja plássi er kinesiski varaforsetin Wu Yi. Í fjør var hon á øðrum plássi.

Tær flestu av hinum kvinnunum, sum eru á yvirlitinum hjá Forbes, sita í leiðandi vinnulívsstørvum, og fremst av teimum er stjóprin í Pepsi, Indra Nooyi. Men onnur sleppa eisini upp í part, og millum tey kendu nøvnini eru senatorurin Hillary Clinton og sjónvarpsverturin Oprah Winfrey.